Vikuskiftis Sosialurin



## Grýludansur í Fuglafirði

Árligi grýludansurin í Mentanarhúsinum í fuglafirði verður leygarkvøldið 9. februar. Grýludansurin hevur verið ógvuliga populerur gjøgnum árini,og vanligt er,at gestirnir gerða nógv burturúr klædningi teirra hetta kvøldið. Eisini verða góðir vinningar til bestu grýlurnar. Spildurnýggi bólkurin Blitz fer at undirhalda gestunum hetta kvøldið. Teir, sum manna bólkin, eru Jóannes Lamhauge, Jens Tummas Næss, Høgni Fagraberg, Hilmar Kass og JamesOlsen.



## Heksir sum leiðarar

21. og 22. februar skipar skeiðstovan Kvasir fyri kvinnuskeiði á Hotel Føroyum um dagligu avbjóðingarnar hjá kvinnum at gerast leiðarar. - Vegurin hjá kvinnum at taka við leiðsluavbjóðingum er ikki so einfaldur, sum hann ofta er hjá monnum. Tvørturímóti er hann krótutur og merktur av nógvari umhugsan. Og hóast kanningar vísa, at kvinnur eru minst líka góðir leiðarar sum menn – bæði menniskjaliga og fíggjarliga – so viðurkenna tær ikki altíð síni leiðaraevni og hava eisini verri við at lata leiðarastarvið ganga út yvir privata netverkið, verður millum annað sagt í tíðindaskrivi frá Kvasir. Undirvísari er Birgitte Laursen frá danska konsulentvirkinum Kurios. Birgette hevur áður verið í Føroyum og er sera vældámd sum skeiðsfyriskipari.

# Stormur og streymloysi



*Neystið hjá einum áhugafelag í Hvannasndi fór í luftina, og bátarnir, sum stóðu inni har, fingu skaða. Gamli Norðoyingur og Ritan verða ikki gjørd aftur, men enn vita teir ikki at siga, hvussu illa nýggi Sundabáturin er farin*

*Mynd: Hjalmar Zachariassen*

**Vindurin kom heilt upp í 40 m/s nú vit upplivdu ringastu ódnina síðani nógv umrøddu jólaódnina í 88. Serliga í Skálavík og í Gøtu herjaði ódnin ógvusliga**

ÓDNARVEÐUR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað kann til tíðir verða baldrut at búleikast á hesum klettum, men tíbetur hoyrir tað til rárar hendingar, at veðrið er so ringt, sum fleiri upplivdu í gjárkvøldið og í nátt.

Men í mun til so mangar aðrar skaðaódnir, vórðu fólk hesaferð ávara – í hvussu er í ein mun, tí hóast boðað var frá ódnarstormi, so upplivdu summar bygdir veðrið væl meiri ógvusligt, enn tey høvdu roknað við framman undan.

Skaðar hava verið um so at siga alt landið, men ringast hevur helst staðið til í Skálavík og Gøtu. Suðuri í Skálavík fóru allir bátarnir, sum vóru í hylinum, sum skilst er talan um einar tíggju bátar.

Aðrir skaðar í bygdini vóru eisini umfatandi, og sama er at frætta úr Gøtu. Har var so ógvusligt ta einum løtuna, at bjargingarliðið ikki hættaði sær útum. Tað var stutt sagt lívshættisligt at vera uttandura, sum tað feyk við tak- og klædningsplátum.

Longutíðliga seinnapartin frættist um eitt gamalt hús, sum var fokið á sjógvin og um ein lastbil, sum var fokin út av vegnum. So ótrúligt tað enn ljóðar, var hesin bilurin fokin mest sum upp aftur á vegin seinni út á seinnapartin.

Annars var mest talan um brotnar rútar, rivnar takplátur og rivnan klæðning í Gøtu, har Norðragøta var harðast rakt.

### Sundabáturin skaddur

Í Hvannasundi var vindurin eisini av tí mesta, og einaferð út á kvøldið førdi hetta við sær, at eitt neyst fór mest sum alt í luftina.

- Yvirtromin fór og norðurveggurin raplaði. Tað førdi við sær, at tveir betongklossar endaði í nýggja Sundabátinum. Í hvussu er tvey borð eru klovin tað, ið sæst, men enn er vónleyst at siga nakað um, hvørt báturin er vorðin skeivur, sigur Júst Poulsen, borgarstjóri í Hvannasundi.

Talan er kortini ikki um sjálvt róðrarneystið, men heldur um eitt neyst, sum eitt áhugafelag hevur keypt og sum teir hava nýtt til barna- og old boys róður. Tað var tí meiri av tilvild, at nýggi Sundabáturin hjá Sunda Róðrarfelag stóð inni har. Róðrarneystið sjálvt liggur í Norðdepli.

Men Sundabáturin er kortini tann, ið er komin best frá vanlukkuni. Hinir báðir bátarnir í eystinum í Hvannasundi, gamli Norðoyingur og Ritan, gjørdust mest sum vrak, og Júst Poulsen sigur, at støða longu er tikin til at »tveita teir burtur«, sum hann tekur til.

Hvirlan, sum gjørdi enda á neystinum, fekk eina veggin at rapla, og hesin datt inn á grannahúsini, sum eru av timbur, og tey fingu rættiliga stóra skaða.

- Takpláturnar av neystinum fuku um hálva bygdina, og arbeiðsmenn hjá kommununi tóku eina plátu upp við sunnastu húsini í bygdini. Neystið stendur mitt í bygdini, so vindurin hevur verið nógvur, sigur Júst Poulsen, borgarstjóri.

Hann sigur, at teir royndu sum frægast at pjøssa um við at leggja trol yvir restinar av neystinum, men teir stóðu ikki á beininum. Og hartil var bølamyrkt, tí streymurin var farin.

- Tað var beinleiðis vandamikið at halda seg uttandura í vindinum og myrkrinum, sigur Júst Poulsen, borgarstjóri.

Annars var bara talan um smávegis tilburðir, onkur rasari var sokkin og tílíkt í Hvannasundi í nátt.

### Streymslit um landið

Størsti parturin av landinum er í streymloysi. Vánaliga veðrið gjørdi tað trupult hjá SEV at umvæla brekini – fyri ikki at siga ógjørligt – og tí máttu fólk bara brynja seg við toli.

Vánaliga veðrið rakti streymveitingina kring alt landið.

### Streymur var bert í hesum økjum:

*Parti av Klaksvík.*
*Eiði og bygdirnar suður til Norðskála.*
*Frá Skálafirði út móti Runavík.*
*Frá Skálafirði út á Strendur.*
*Toftir og Æðuvík.*
*Vestmanna.*
*Parti av Havnini.*
*Nólsoy.*
*Koltri og Hesti.*
*Skopun og Sandi.*
*Suðuroyðni.*

Øll restin av landinum lá í streymloysi.

Fólk tóku ógvuliga ymiskt móti hesum streymsliti. Meðan summi einki dámdu hetta, nýttu fleiri onnur høvi at hugna sær saman við einumhvørjum spæli.

Men ikki hjá øllum var talan um tann reina hugna. Streymslitið førdi við sær, at høvuðssendarin hjá Rás2 varð óvirkin, og tað merkti aftur, at Rás2 mátti gevast við at senda áleið 21.45, tó at ætlanin var at senda mundandi longer.

Hetta merkti eisini Portalin, sum gavst tímans tíð seinni.

Ikki fyrr enn í morgun og út á fyrrapartin byrjðu bygdirnar at fáa streymin aftur. Men av SEV siga tey, at tað er torført arbeiði, og tað gongur bara spakuliga framá. Men nær alt landið hevur fingið streymveitingina aftur, tora tey als ikki at siga nakað um tá vit tosaðu við tey beint undan miðdegi.

Meiri verður at frætta um hetta á Rás2 gjøgnum dagin.